# ítróttur

Nr. 50 • hósdagur • 13. mars 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

Hjálparvenjarin, John »Faxe« Jensen:

## – Jón Rói er sum eitt frískligt lot í Brøndby-hópinum

**Venjaraparið í Brøndby, John Faxe og Michael Laudrup, hava tol við Jón Róa, sum fær tíð at venja seg við lopið frá føroyskum fótbólti til superligafótbólt**

ÚTISETAFELAG
*Páll Holm Johannesen*

Fyrrverandi HB-leikarin, Jón Rói Jacobsen, hevur rættiliga gjørt vart við seg í Brøndby. Sambært hjálparvenjaranum í Brøndby, John "Faxe" Jensen, er ungi havnarmaðurin sum eitt frískligt í Brøndby-hópinum. Ummælið ber boð um, at føroyingurin seinastu tveir mánaðirnar hevur bitð frá sær í danska meistaraliðnum.

Danska superligan fer aftur av bakkastokki leygardagin. Við føroyskum eygum er størstur spenningur, um føroyski landsliðsleikarin verður við í Brøndby-hópinum, tá meistararnir úr Brøndby seinnapartin leygardagin fáa vitjan av Viborg.

Tað er rættiliga stórt trýst at seta á 19 ára Jón Róa Jacobsen, at hann alt fyri eitt skal vinna sær pláss í Brøndby-verjuni. Hin føroyski leikarin í superliguni, Todi Jónsson, nýtti á sinni yvir eitt ár, áðrenn hann gjørdist fastur maður á superliga-liðnum hjá Lyngby. Tað kann tí tykjast heldur veruleikafjart, at Jón Rói, eftir bert tveir mánaðir, skal eydnast at fáa pláss á Brøndby-liðnum.

Skoðsmálini hjá føroyska landsliðsleikaranum hava verið góð higartil, og tí er tað kanska ikki so heilt veruleikafjart, at Jón Rói verður ímillum teir 16 leikarnar, sum venjaraparið, Michael Laudrup og John Faxe, ætla at hava fyrsta dystinum leygardagin.

### Misjavnir venjingardystir

Brøndby fór undir fyrireikingarnar til várhálvuna fyrst janurar-mánað, og síðan hava Michael Laudrup og John Faxe dýkt á sínar menn. Í alt hevur danska meistaraliðið leikt 10 venjingardystir.

- Úrslitini og spælið í venjingardystunum hava verið misjøvn, men vit eru væl fyrireikaðir, nú kappingin byrjar aftur, sigur John Faxe við Sosialin.



*Hjálparvenjarin í Brøndby, John Faxe Jensen, sigur, at teir í Brøndby hava tol við Jón Róa Jacobsen, sum skal venja seg við leikferðina í superliguni.*

*Mynd: Savnsmynd*

Miðskeiðis í februar var Brøndby á venjingarlegu í Turkalandi. Flestu feløgini í superliguni fara vanliga á venjingarlegu uttanlands, har heitari er í veðrinum, og vallirnir eru í betri standi.

Á ferðini í Turkalandi vórðu fleiri venjingardystir leiktir, og allar mans sluppu at royna seg. Sambært John Faxe var venjingarleguna í Turkalandi vera sera væleydnað, har høvi var at síggja, hvør dugur var í nýggju leikarunum, sum eru komnir til felagið í vetrarsteðginum.

Jón Rói hevur leikti teir fyrstu venjingardystirnar í verjuni, men seinastu dystirnir hevur hann sitið á beinkinum. Brøndby var í seinastu viku í Onglandi, har teir leiktu ímóti Brentford og Charlton. Í dystinum ímóti Brentford, fekk Jón Rói sítt fyrsta mál í Brøndby-troyggjuni.

### Hava tol við Jón Róa

Brøndby hevur mist fleiri týðandi leikarar í vetrarsteðginum, og í teirra stað eru tríggir ungir leikarar komnir. Umframt Jón Róa, so eru áleyparin, Karsten Johansen, komin úr Næstved og Niki Zimling úr unglingaliðnum í Brøndby-hópin.

Spurdur um, at tá so týðandi leikarar sum Mogens Krogh, Allan Ravn, Thomas Lindrup og Peter Madsen ikki eru at finna í hópinum longur, um eitt felag sum Brøndby ikki átti at havt sett leikarar við størri royndum við, svarar John Faxe, at tað sær hann ikki sum nakran trupulleika, tí felagið hevur altíð gjørt nógv við ungdómsarbeiðið.

- Teir ungu hava klárað seg væl í venjingardystunum, og eg og Michael óttast als ikki at seta ungu leikararnar á vøllin, tí teir skulu eisini venja seg við leikferðina í superliguni, sigur hjálparvenjarin.

John Faxe ásannar, at tað kann tykjast eitt stórt lop hjá nýggju leikarunum at venja seg við leikferðina alt fyri eitt, og tí er neyðugt at ein hevur tol við ungu leikarunum.

- Vit fara at geva Jón Róa hetta hálva árið, hvør dugur er í honum, og hvussu hann megnar at umstilla seg til superliguna, tí lopið úr føroyskum fótbólti til superliguna er stórt, vísir Brøndby-hjálparvenjarin á.

Jón Rói hevur verið í Brøndby í góðar tveir mánaðir, og Michael Laudrup og John Jensen, hava tí fingið høvi at hyggja nærr at dygdunumhjá føroyska landsliðsverjuleikaranum.

John Faxe vísur á, at Jón Rói hevur ein frágera góðan hugburð til fótbóltin, gott yvirblik, sterkur í luftini og skjótur. Størsta dygdin hjá Jón Róa er sambært hjálparvenjaranum, at honum dámar at spæla fótbólt, soleiðis skilt, at hann heldur seg til at spæla seg frameftir vøllinum, heldur at sparka, sum mangir verjuleikarar hava lyndi til.

Hjálparvenjarin ásannar tó, at føroyingurin hevur nakrar veikleikar. Jón Rói skal venja seg við at standa rætt á vøllinum, og leikferðina skal hann eisini venja seg við.

Tá vit spyrja John Faxe, um hvussu útlitini eru hjá føroyinginum at fáa sáttmála við Brøndby, vísir hjálparvenjarin ikki møguleikanum aftur.

- Jón Rói er í holt við at læra nógv nýtt, og alt eftir hvussu hann fer at standa seg í vár, fer at avgera um vit fara at knýta hann til felagið, sigur fyrrverandi Herfølge-venjarin.

### Ætla at vera besta liðið í vár

John Faxe er bjartskygdur um útlitini fyri restina av kappingarárinum.

– Vit settu í byrjani av kappingarárinum eina ætlan við Brøndby út í kortið, og hóast úrslitini í heyst ikki altíð vóru okkum til lýtar, so ætla vit at halda fast við hana greiðir Faxe frá.

Venjaraparið í Brøndby, Michael Laudrup og John Faxe, boðaðu undan kappingarárinum, at spælskipanin skuldi leggjast um. Teir vildu leggja seg eftir at spæla mest undirhaldandi fótbóltin í Danmark, og kravið var tí til allar leikararnir í Brøndby hava góðan bóltførleika.

Hóast Brøndby spældi spennandi álopsfótbólt í heyst, so vóru úrslitini ikki altíð til vildar. Hjálparvenjarin vísur á, at hóast liðið spældi besta fótbóltin, so manglaði støðuleiki, og at fáa umsett teir mongu málmøguleikarnar til mál.

Í Brøndby verður ikki tosa um meistarheitið. Felagið ásannar, at frástøðan er stór til FCK, og tí má málið fyrst og fremst vera at vinna sær sess í evropeisku kappingum í heyst.

- Vit ætla okkum at vera besta liðið í vár, t.v.s at vit ætla okkum at fáa flest stig í várhálvuni, og um tað so røkkur til at fáa FCK aftur, tað má bara tíðin vísa, sigur John Faxe at enda.

Leygardagin verður so fyrsti dysturin hjá Brøndby í kappingini í royndini at fanga FCK aftur. Dysturin verður ímóti Viborg, og Faxe vil onki siga um ein føroyingur verður í Brøndby-hópinum. Tað fáa vit at vita seint hósdagin ella fríggjadagin, tá hann og Laudrup fara at kunngera hópin.

### Fakta

Brøndby liggur í løtuni á øðrum plássi í superliguni, - níggju stig eftir FCK.

Liðið hevur vunni átta dystir, leikt fimm javnar og tapt fimm dystir

Toppskjútti er Morten Wieghorst við sjey málum

Tilgongd: **Jón Rói Jacobsen ( HB, leigaður)**, Karsten Johansen(Næstved), Niki Zimling (unglingaliðnum)

Frágongd: Mogens Krogh(givin), Allan Ravn (Landskrona), Thomas Lindrup (OB), Peter Madsen (Wolfsburg, leigaður), Mikkel Jensen (Hammerby), Søren Krogh, Rafal Niznik og Søren Larsen (allir leigaðir til Frem)





## VÍF tikið avleiðingarnar

**Felagið hevur valt at leikbanna leikara restina av kappingarárinum**

HONDBÓLTSROK
*Páll Holm Johannesen*

Leiðslan í VÍF hevur tikið avleiðingarnar av rokinum, sum var í dystinum millum Kyndil og VÍF sunnudagin. Felagið hevur valt at revsa leikara við leikbanni restina av kappingarárinum.

Vestmenningar hava sambært tíðindaskrivinum gjørt eina reglugerð, hvussu slíkir tilburðir sum sunnudagin skulu revsast.

Onki stendur í tíðindaskrivinum um, hvør leikari talan er um. Talan at allarhelst um rumenan, Piti Negru, sum var ein av leikarunum, ið var í rokanum ímóti endanum av dystinum. Fleiri kyndils-fólk vildu vera við, at Piti gjørdi seg harðliga inn á ein av kyndilsleikarunum, tá hesin var á veg av bonkinum á vøllin.



*Formaðurin í VÍF, Jógvan Sigurd Poulsen, hevur saman við venjara og liðformanni í felagnum, avgjørt at leikbanna leikara fyri tilburðin sunnudagin ímóti Kyndli*

*Mynd: Savnsmynd*

## Tíðindaskrivið frá VÍF

Landskappingardysturin í manshondbólti 09.03.03 millum Kyndil og VÍF, 1.deild menn.

Vísandi til tað óhepnu og lítið ítróttarliga støðu, ið tók seg upp, seinast í omanfyri nevnda landskappingardysti í Høllini á Hálsi, sunnudagin 09.03.03, hevur nevndin í VÍF, saman við venjarum og liðformanni, viðgjørt tilburðin og dystin sum heild.

Niðurstøðan hjá omanfyri nevndu er, at fleiri tilburðir í dystinum eru átaluverdir og lítið sømiligir og berða ikki brá av ítróttaranda.

VÍF harmast lítið sømuligu atburðirnar og ásannar, at um hondbóltsleikur skal fara fram á sømiligan hátt og í góðum ítróttaranda, eiga leikarar ikki at sleppa órevsaðir frá tílikum tilburðum.

VÍF hevur tí á fundi 10.03.03, tikið hesa avgerð:

»Ger leikari felagsins seg sekan í grovum broti á ítróttarandan og av hesi orsøk kann koma øðrum – viðleikara, mótleikara, dómara ella áskoðara – í vanda, kann felagið revsa viðkomandi. Nevnd, venjarar og liðformaður taka avgerð um, hvør revsingin skal verða.«

Vísandi til seinastu løtuna í dystinum 09.03.03, hevur VÍF avgjørt at taka sína ábyrgd av tí óhepnu støðu, ið tók seg upp og hevur revsað leikara við leikbanni, restina av kappingarárinum.

**Við hondbóltskvøðu VÍF**

Kristian Johansen, dómari sunnudagin:

## -Ótrúliga flott av vestmenningum

HONDBÓLTSROK
*Páll Holm Johannesen*

Annar av dómarunum sunnudagin í dystinum millum Kyndil og VÍF, Kristian Johansen, er fegin um, at VÍF hevur tikið í egnan barm, og tikið avleiðingarnar av tilburðinum sunnudagin.

- Hatta er ótrúliga flott av vestmenningum, sum sanniliga vísa góðan ítróttaranda, tí hondbóltssambandið kann ikki gera tað stóra við málið, sigur Kristian Johansen

Dómarin sunnudagin leggur afturat, at um Kyndil var í somu støðu, so høvdu teir ivaleyst eisini tikið avleiðingarnar.

### HSF hjálparsleyst

Hondbóltssambandið kann ikki gera nakað við keðiliga tilburðin sunnudagin, tí dómararnir sóu ikki hendingina. Møguligar avleiðingar av einari slíkari hending, er treytað av frágreiðingini frá dómarunum. Tá hesir ikki sóu hendingina, stendur honbóltssambandið á berum.

Spurningurin er so, um sjónvarpsupptøkur av hondbóltsdystum skal nýtast í framtíðini sum prógv, tá slíkt rok sum sunnudagin tekur seg upp.

- Í løtuni hava vit ikki loyvi at nýta sjónvarpsupptøkur, men tað kundi verið sera hent í fleiri førum, vísir Kristian Johansen á.

Sjónvarpsupptøkur eru ei heldur loyvdar sum prógv í altjóða dystum, og enn røkist ikki fyri, at tær vera loyvdar í nærmastu framtíð.

Kristian Johansen sigur at enda, at sjónvarpsupptøkur høvdu bæði verið til gagns fyri dómararnar og sanniliga eisini hondbóltsspælararnar.

## Eivør á Jackways

**Komandi leygarkvøld fer føroyski songfuglurin at hava live-framførslu á føroyska dansistaðnum í Keypmannahavn**

KEYPMANNAHAVN
*Jákup Mørk*

Føroyska dansistaðið í Keypmannahavn, Jackways, hevur seinsta árið fingið fótin alt meira fastan millum føroyingar í høvuðsstaðnum.

Einamest hava tað verið leygarkvøldini, sum hava verið ætlað føroyingunum, og tó at skráin ikki hevur verið so øgiliga nógv øðrvísi, enn hon er á flestum vanligu donskum dansistøðum, so hevur undirtøkan verið góð. Sjálvandi hava føroysku starvsfólkin og føroyska ølið sítt at siga, men í aðrar mátar líkist umhvørvið heilt nógv tí danska.



*Føroyski sangfuglurin skal komandi leygarkvøld spæla á føroyska dansistaðnum Jackways*

Nú verður tó ein roynd gjørd at gera staðið til eitt sindur meira føroyskt. Sum eina roynd hava eigararnir av Jackways fingið føroysku Eivør Pálsdóttir til Danmarkar, og leygarkvøldið fer hon at hava live-framførslu. H e t t a verður skipað sum eitt lítið slag av hugnakvøldið, har Eivør í einar tveir tímar fer at sita við guitaranum og spæla og syngja løg av ymsum slag.

Suni Skylv Reinert, sum er ein av eigarunum sigur um nýggja tiltakið, at hetta fyrst og fremst verður gjørt sum ein roynd.

- Vit hugsa sjálvandi altíð um, hvussu vit kunnu gera umhvørvið enn betri, og nú fara vit so at royna hetta. Eivør byrjar sína framførslu um hálvgum-tíggju tíðina, og fer so at spæla og syngja í einar tveir tímar, sigur hann.

- Eftir framførsluna hjá Eivør verður plátuvendari, soleiðis sum vit vanliga hava tað leygarkvøld, men ætlanin er, at hesir fyrstu tveir tímarnir skulu líkjast meira einari hugnaløtu. Tí hava vit eisini gjørt av, at tað verður avmarkað, hvussu nógv fólk sleppur inn hesar tímarnar, so fyri at vera vís í at sleppa inn, eiga fólk helst at tryggja sær atgongumerki undan leygarkvøldinum.

- Sum sagt, so er hetta í fyrsta umfari ein roynd, sum vit gera. Men tað sigur seg sjálvt, at um hetta tykist hava góða undirtøku, so fara vit avgjørt at skipa fyri líknandi tiltøkum við jøvnum millumbilum, sigur Suni Skylv Reinert at enda.